# Henrik Larsen nýggjur landsliðsvenjari

**Nú er tað greitt, at danin Henrik Larsen verður venjari hjá føroyska A-landsliðnum komandi árini**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Fótbóltssambandið boðaði fjølmiðlum til tíðindafund mánadagin klokkan 12.30, har nýggi landsliðsvenjarin varð avdúkaður.

Hvørki formaðurin ella skrivarin í FSF vilja vátta, at talan er um Henrik Larsen, men fyrrverandi danski landsliðsvenjarin var við flogfarinum hjá Atlantic Airways úr Kastrup til Vágarnar mánamorgunin. Fyri honum stóð formaðurin í landsliðsnevndini, Jens Erik Magnussen. Teir sluppu sær avstað beinanvegin.

Henrik Larsen hevur spælt 39 dystir fyri danska A-landsliðið. Hansara størsta avrik var, tá hann gjørdist toppskjútti hjá Danmark í EM-endaspælinum í Svøríki í 1992. Hann skeyt fleiri avgerandi mál fyri liðið, sum so sera óvæntað gjørdist Evropameistari.



*Henrik Larsen skal vera nýggjur landsliðsvenjari. Hetta varð avdúkað á tíðindafundi mánadagin á middegi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Henrik fór undir yrkisleið sína í Lyngby síðst í áttatiárunum. Hann spældi síðani við Pisa í Italia frá 1990 til 1992. Eftir EM-endaspælið legði hann leiðina til Aston Villa í Onglandi. Upphaldið var tó ikki langt, tí longu sama árið skifti hann aftur felag, hesuferð til Waldof Mannheim. Her spældi hann frá 1993 til 1994. Síðani fór hann aftur til Lyngby, har hann spældi í tvey ár. Í 1996 fór hann til FC København, har hann seinni gjørdist hjálparvenjari.

Seinastu tíðina hevur Henrik Larsen verið venjari hjá Ølstykke í donsku 2. deild. Tað verður sostatt Henrik »Store« Larsen, sum hann eisini verður nevndur, ið skal taka sær av føroyska landsliðnum komandi tíðina.

Meira verður at frætta um nýggja landsliðsvenjaran í blaðnum í morgin.



*Henrik Larsen var toppskjútti hjá danska landsliðnum, tá Danmark vann EM í 1992*

2. deild: NSÍ – KÍ 0-2 (0-2)

## KÍ fekk endurreisn

**KÍ vann á útivølli móti NSÍ, eftir at klaksvíkingar taptu heili 8-1 móti ÍF fyri viku síðani. Sigurin var uppiborin, og Olgar Danielsen var aftur á blettinum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

KÍ vann heldur óvæntað á NSÍ í Runavík leygardagin. Eftir at KÍ tapti 8-1 móti ÍF í seinastu viku, hevði eingin væntað sær nakað serligt frá teimum. Men tað eydnaðist klaksvíkingum at vinna 2-0, og sigurin var uppiborin.

Tað var Olgar Danielsen, sum legði KÍ á odda eftir fimtan minuttir í fyrra hálvleiki. Leon Bjartalíð legði innfyri úr høgru síðu, og bólturin datt fyri føturnar á Helmari Lassen, sum tó ikki fekk skot á. Bólturin datt heldur tilvildarliga til tann gamla málrevin Olgar Danielsen, og hann fekk bóltin framvið málverjanum til 1-0.

Tá tíggju minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki eydnaðist tað KÍ at økja um leiðsluna. Leon Bjartalíð fekk bóltin á miðvøllinum, og hann rak oman móti málinum. Úr 30 metra fjarstøðu royndi hann seg við langskoti, sum endaði í málinum. Eitt sera vakurt mál verður sagt úr Runavík.

KÍ-spælararnir vildu fegnir hava eyðmýkjandi tapið í Fuglafirði av herðunum, og tí kempaðu teir sera væl allan dystin. NSÍ fekk tó eisini nakrar málmøguleikar í sín lut, men hesir vórðu allir brendir. Tað nærmasta, sum NSÍ kom einum máli, var tá bólturin brast í stongina. KÍ hevði hinvegin tvær roydni á træverkið.

### Farnir at venja

Tá KÍ tapti í Fuglafirði hevði liðið ikki vant nakað serligt, men farnu vikuna hava leikararnir á 2. liði verið til venjingar, og tað hevur givið úrslit.

Kurt Mørkøre hevur átikið sær venjingina av 2. deild umframt besta liðnum hjá felagnum, og nú tykist sum skil er komið á karmarnar kring 2. deild hjá KÍ.

NSÍ hevur einki stig eftir dystir, og tað hevur heldur ikki eydnast at fingið nakað mál hesar 180 minuttirnar. Komandi vikuskiftið tekur KÍ ímóti LÍF í sínum fyrsta heimadysti, meðan NSÍ skal til Vágs.

<u>NSÍ – KÍ 0-2 (0-2)</u>
1-0: Olgar Danielsen
2-0: Leon Bjartalíð









# Eingin ivi



*Todi var umgyrdur av tíðindafólkum, so skjótt sum hann kom úr skiftirúminum, og samrøðuevnini vóru sjálvsagt tey bæði brotsspørkini, sum hann kendi seg snýttan fyri*

**Todi Jónsson var sjálvsagt vónbrotin eftir javnleikin móti Brøndby. Ikki minst var hann harmur um væntandi brotsspørkini, sum hann sjálvur segði vóru klokkuklár**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Høvdu føroysku umboðini fyri fjølmiðlarnar roknað við, at fáa frið til at tosa við Toda Jónsson eftir dystin hesaferð, so fóru vit í øllum førum skeivir í hesum.

Sum ein av teimum seinastu kom Todi úr skiftirúminum, og alt fyri eitt var hann kringsettur av tíðindafólkum, sum vildu hava at vita, hvat hann helt um støðurnar, sum flestu hildu skuldi kastað brotsspark av sær.

- Tað var brotsspark. Eingin ivi um tað, helt føroyski leikarin fyri, áðrenn hann greiddi frá, hvussu hann upplivdi hesar støðurnar

- Fyrru ferðina verið eg togaður niður, so eg ikki røkki eftir bóltinum, og seinnu ferðina verið eg tikin av Krogh.

Spurdur, um hann ikki kundi roynt meira eftir málinum, heldur enn eftir brotssparkinum, var svarið stutt og greitt:

- Hvussu kundi eg tað. Eg fekk ikki runnið fyri Krogh, sum tveitti seg niður í føturnar á mær.

Hóast hann soleiðis helt avgerðirnar hjá dómaranum vera skeivar, so vildi hann ikki fara so langt, sum at siga, at eitt dómaramistak hevði kostað teimum meistaraheitið.

- Nú skal eg nokk ansa eftir, hvussu nógv eg sigi. Eg haldi sjálvur, at Milton er ein góður dómari, sum eg havi stóra virðing fyri, men sjálvandi mær dámt betri, um hann floytaði hasar báðar ferðirnar, var einasta viðmerkingin til hetta.

### Heystið kostaði

Um árið sum heild, so mátti Todi fyrst og fremst ásanna, at nú verður tað Brøndby, sum verður meistari.

- Teir høvdu eitt sera gott heyst, har vit høvdu okkara trupulleikar við skiftandi venjarum og øðrum. Í vár hevur støðan so verið hin øvugta. Vit hava spælt væl, og vunnið hópin av dystum, men tað var so ikki nóg mikið. Heldur ikki hóast vit í dag vóru klárt betra liðið.

Nú avgerðin var follin. Bæði í lands- og steypakapping, var tað sjálvandi nakað, sum fleiri fregnaðust um, og Todi var eisini púrasta reiðiligur, tá hann fekk spurningin.

- Jeg har det ad helvede til, vóru boðini, meðan hann síðani royndi at geva sítt boð um, hvat leikararnir hugsaðu nú eftir dystin.

- Sjálvandi er lagi í botni, og tað verður kanska eisini rópt og sparkað inni í skiftirúminum. Vit mistu jú møguleikan fyri gullmerkjunum í dag, so tað er einki at siga til, helt føroyski leikarin hjá FCK.

Enn hevur FCK á pappírinum møguleikan at vinna gullmerkini, men hetta krevur helst eitt undir av teimum heilt stóru. Í seinasta dystinum skal Brøndby spæla móti Lyngby, og vinna teir blá/gulu tann dystin, er meistaraheitið heima.

Lyngby hevur sum kunnugt havt sínar stóru trupulleikar at dragast við í vár. Felagið er farið á húsagang, og eingin av yrkisleikarunum eru longur á liðnum, sum í staðin er mannað við áhugaleikarum, og hóast Føroyar á sinni vunnu móti Eysturríki, so er tað helst ov nógv at krevja, at tað skal verða Lyngby, sum hjálpir FCK. Tann møguleikan høvdu leyvurnar sjálvar sunnudagin, men hann varð misnýttur, og so hjálpir tað lítið at iðra seg.

## Lítið at siga



*Tað var óvanliga fámæltur Flemming Østergaard, sum gekk millum tíðindafólkini*

**Stjórin í FCK, Flemming Østergaard, royndi at halda høvdinum høgt, men vónbrotið um mista meistaraheitið var tó kortini sjónligt**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Tað var ein sjónliga vónbrotin Flemming Østergaard, sum eftir dystin í Parkini spákaði millum tíðindafólkini. Vanliga so fyrikomandi FCK-stjórin royndi kanska at látast at halda høvdinum høgt, men hann var tó sera fáorðaður, tá vit spurdu, hvussu hann kendi tað, nú liðið innan fýra dagar hevur tapt at kalla tveir finaludystir.

- Í dag kennist hetta eitt sindur løgið. Vit spæla ein góðan fótbóltsdyst, har vit eru nógv betra liðið, men sjálvandi er tað keðiligt at tapa. Vit mugu tó royna at hyggja positivt upp á tað, og sum sagt, so haldi eg, at vit kunnu vera ernir av avrikinum í dag.

Spurdur, um hann ikki eisini er errin um, at FCK hóast alt megnaði at toga somikið væl inn á Brøndby, eftir at munurin eitt skifti hevði verið heili stig, fekk stjórin ikki meira enn ypt øksl, so vónbrotið var sjónligt.

- Sjálvandi er tað eisini nakað, sum vit kunnu fegnast um. Vit mugu sum sagt royna at hugsa positivt, og so líta frameftir, var einasta viðmerkingin til hetta.

Og tá vit at enda spurdu, hvørt hann kanska ætlaði at styrkja um liðið, til tess at røkka einum enn betri úrslitið komandi árið, var einasta svarið, at tað máttu vit tosa við venjaran um.

# Eitt keðiligt farvæl

**Stjørnuskotið hjá FCK var í ringum hýri, hóast hann í ár hevur fingið sítt stóra gjøgnumbrot, er seldur til týskt topp lið og er komin á danska landsliðið'**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein – Parken*

Ein av stóru profilunum hjá FC Keypmannhavn í hesum kappingarárinum hevur verið ungi Christian Poulsen, sum fyri einum ári síðani var eitt ókent fótbóltsnavn.

Hann hevur rættiliga gjørt vart við seg í hesum árinum, og hann hevur eisini fingið ein gyltan sáttmála við týska stórfelagið Schalke 04, har hann skal spæla eftir summarferiuna.

Christian Poulsen er eisini komin á danska landsliðið og er millum kosnu spælararnir, sum skulu umboða Danmark í HM-endaspælinum, sum byrjar síðst í mai mánaði.



*– Hetta er eitt stórt vónbrot. Sjálvandi hevur tað gingið væl hjá mær í ár, men júst nú eri eg bara keddur um, at vit ikki vunnu dystin í dag, segði Christian Poulsen*

### Einki gull

Hóast tað hevur gingið strúkandi hjá miðvallarspælarunum í ár, var hann keddur um støðuna, tá hann kom av vøllinum sunnudagin.

– Hetta er eitt stórt vónbrot. Sjálvandi hevur tað gingið væl hjá mær í ár, men júst nú eri eg bara keddur um, at vit ikki vunnu dystin í dag, segði Christian Poulsen.

– Vit spæla ikki okkara besta dyst í dag, men vit eru tað betra liðið og høvdu uppborið sigurin. Marginalarnir eru ímóti okkum, vit verða snýttir fyri tvey brotsspørk, og nú mugu vit ásanna, at vit vinna einki gull í ár, segði hann.